tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Hallur í Heiðunum, Anita Vibergsdóttir, Marjun Olsen, Marit Poulsdóttir og Jens Johannesen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Støðutakan til umbøn um meir-fígging til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini | 2 |
| 2 | Støðutakan til, um Tvøroyrar kommuna stendur aftanfyri umsókn um fíggjarligan stuðul frá NORA til ráðstevnu um tilbúgving | 3 |
| 3 | Tilboð frá Ansni um framhaldandi vaktarhald | 4 |

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**20.13.00-I00-1-16**

## 1. Støðutakan til umbøn um meir-fígging til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini

### Málsfrágreiðing

Fígging manglar í sambandi við liðugt-greð av Saltsilo-verkætlanini á Drelnesi. Sambært Tummasi Sørenesn, verkætlanarleiðara, vísir síðsta uppgerð, at 7,6 mió. kr. mangla í fyri at gera arbeiðið liðugt. Hetta er ein framroknað endalig upphædd til at gera ymisk arbeiði liðug innan- og uttandura.

A.P. Møller Grunnurin hevur sent bræv til Saltsilo-Grunnin, sum Tvøroyrar kommunua hevur fingið innlit í, har tað stendur skrivað, at A.P. Møller Grunnurin vil veita ein eyka fíggjarligan stuðul til liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini á 3. mió. kr. við tí fyritreyt, at Tvøroyrar kommuna stuðlar verkætlanini við somu upphædd.

**Býráðið, 14. september 2016, pkt. 1:**

Jens Johannesen mælir til, at málið verður beint aftur í fíggjarnevndina til at umrøða møguligar fíggingarleistir í mun til, at Tvøroyrar kommuna kann veita meir-fígging til liðugt-gerð av verkætlanini. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá Jens Johannesen.

**Fíggjarnevndin, 21. september 2016, pkt. 1:**

Kristin Michelsen mælir til, at Tvøroyrar kommuna, vísandi til bræv frá A.P. Møller Grunninum, dagfest 1. september 2016, stuðlar liðugt-gerð av Saltsilo-verkætlanini við 3. mió. kr. Henda upphædd fíggja við 1. mió. kr. av rakstrinum í 2016 og 2. mió. kr. av rakstrinum fyri januar 2017.

Bjarni Hammer og Hallur í Heiðunum mæla til, at aðrir møguleikar fyri fígging, heldur enn yvir raksturin hjá Tvøroyrar kommunu, verða kannaðir eitt nú í samstarvi við Saltsilo-Grunnin, Løgtingið, Fíggjarmálaráðið og privatar íleggjarar.

Bjarni Hammer vil hava viðmerking um, at hann heldur tað vera sera óheppið, at aðrir fíggingar-møguleikar, eigaraviðurskifti og um tað er møguligt, at gera brúk av rakstrarjáttanini í 2017 til íløgur, ikki verða kannaðir nærri áðreenn málið verður lagt fyri Býráðið til støðutakan.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um, at hann hevur sent fyrispurning til Fíggjarmálaráðið um nøkur viðurskifti í sambandi við veitan av stuðli til Saltsilo-verkætlanina. Svar er ikki enn komið frá Fíggjarmálaráðnum. Tí verður málið tikið av skrá á hesum fundinum, og tikið upp aftur til nýggja viðgerð á einum býráðsfundi seinni.

### Skjøl

- Flyting av upphædd á konti frá rakstri til íløgur
- Yvirlit yvir semju 14.09.2015.pdf
- 7. Byggeprisen endelig-Oversigt 15.09.2016.doc
- Aftale TG Verk og SF 15.09.2016.doc
- Fremskrevet byggeregneskabsoversigt 21.09.2016.pdf
- Uppskot frá fíggjarleiðara til, hvussu stuðulin til liðugt-gerð av Saltsiloini kann fíggjast
- Bræv frá A.P. Møller grunninum, avhenda í dag av Ólavi Rasmussen
- Frágreiðing í.s.v. fund við Ólav Rasmussen, Høgna Lauritsen og Tummas Sørensen
- Notat, har Ólavur Rasmussen kunnar um status í sambandi við liðugtgerð av Saltsiloini

**14.00.00-A00-2-16**

## 2. Støðutakan til, um Tvøroyrar kommuna stendur aftanfyri umsókn um fíggjarligan stuðul frá NORA til ráðstevnu um tilbúgving

### Málsfrágreiðing

Kommunustjórin ynskir at søkja NORA - Nordisk Atlantsamarbejde - om fíggjarligan stuðul á kr. 345.544,- til fyriskipan av ráðstevnu á Tvøroyri og í einari grønlendskari kommunui um tilbúgving. Freistin at søkja er 3. oktober í ár. Endamálið við tveimum ráðstevnum við tilhoyrandi verkstovum um tilbúgving, har umboð fyri politiska myndugleikan, aðalráð og operativar myndugleikar - føroyskar og danskar - luttaka, er, at arbeiða fram ímóti einari kommunalari strategi fyri tilbúgving á Tvøroyri, sum samtíðis kann menna tilbúgvingina hjá landinum.

Ein fortreyt fyri, at fáa ein tílíkan stuðul frá NORA er, at tað er ein myndugleiki, ið stendur aftanfyri umsóknina. Tí verða fíggjarnevnd og nú Býráðið spurd, um Tvøroyrar kommuna kann standa aftanfyri hesa umsókn til NORA.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Umsóknin til NORA er nærum liðugt skrivað.

**Fíggjarnevndin, 21. september 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin mælir til, at Tvøroyrar kommuna sum myndugleiki stendur aftanfyri umsóknina til NORA um fíggjarligan stuðul til ráðstevnu um tilbúgving.

Málið beint í Býráðið til støðutakan.

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við, at Tvøroyrar kommuna sum myndugleiki stendur aftanfyri umsókn til NORA viðvíkjandi ráðstevnu um tilbúgving.

### Skjøl

- Umsóknarskjal
- Fíggjarætlan í.s.v. umsókn til NORA

**82.13.00-P00-1-15**

## 3. Tilboð frá Ansni um framhaldandi vaktarhald

### Málsfrágreiðing

Býráðið samtykti tann 9. mars í ár, at taka av tilboðið frá Trygdarfelagnum Ansni um vaktarhald við Býráðsskrivstovuna í eina royndartíð á 3 mánar til ein mánaðarligan kostnað á kr. 1.980,- u/mvg.

Hóast henda royndartíð við vaktarhaldið gekk út í juni mánaða í ár, so hevur Ansni framvegis vaktarhaldið her.

Nú má støða takast til, um vaktarhaldið skal halda áfram í einari formligari avtalu við Ansni. Signar Strøm frá Ansni í Suðuroy hevur upplýst fyri kommunustjóra Henrik Weihe Joensen, at verandi vaktarhald, sum inniber eftirlit við Býráðsskrivstovuni eina ferð hvørja nátt árið runt, kann víðkast til tvær ferðir til ein eyka-kostnað á kr. 200,- ella kr. 300,- mánaðarliga.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 21. september 2016, pkt. 3:**

Fíggjarnevndin avgerð, at vaktarskipanin hjá Ansni við býráðsskrivstovuna á Tvøroyri heldur áfram árið út, og at ein víðari sáttmáli við Ansni verður tikin upp til nýggja viðgerð í sambandi við arbeiðið við fíggjarætlanini 2017.

## Avgerð

Býráðið tók kunningina um framhaldandi vaktarhald hjá Ansni til eftirtektar.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 17:25**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Hallur í Heiðunum

Anita Vibergsdóttir

Marjun Olsen

Jens Johannesen

Marit Poulsdóttir



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 11/2016 |
| Fundardagur | 23. september 2016 kl. 17:00-17:25 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan